

www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 02 - 2012

# Bretland og Frakland fáa onga olju úr Iran

Myndugleikarnir í Iran kunngjørdu í gjár, at teir høvdu gjørt av at steðga allari oljusølu til Bretlands og Fraklands. Sambært talsmanninum hjá stjórnini í Teheran verður oljan seld øðrum keyparum. ES-londini samtyktu herfyri, at londini í samveldinum skulu gevast at keypa olju úr Iran frá 1. juli í ár. Endamálið var at leggja størri trýst á Iran fyri at fáa landið at gevast við sínum kjarnorkuætlanum. Iran mótmælti avgerðini hjá ES og tók uppaftur, at landið ætlar sær ikki at brúka kjarnorkuna til hernaðarlig endamál, men einast til elorku. Í síðstu viku kom fram, at Iran hevði steðgað oljusøluni til Grikkalands, Portugal, Spania, Italia og Niðurlond. Mett verður, at umleið 20 prosent av oljuni, sum hesi londini brúka, er higartil komin úr Iran. Hinvegin meta greinarar ikki, at iranska avgerðin at steðga oljusøluni til Bretlands og Fraklands fær nakra ávirkan. Teir vísa á, at bara trý prosent av oljuni, sum Frakland innflutti í fjør, kom úr Iran, og at Bretland keypti als ikki olju úr Iran í fjør.